– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Frálíkt raðhús í Berjabrekku

**Vil tú búgva væl og ómakaleyst í góðum umhvørvi, so er sera hugnaliga, snøgga og væl hildna raðhúsið í Berjabrekku ein góður møguleiki.**









## Umhvørvið

Tá ið tú koyrir niðan eftir Sundsvegnum, snarar tú til vinstru við Mylnuna inn í Berjabrekku og síðani aftur til vinstru. Økið er alt liðugt gjørt – snøgt og snotiligt. Við síðuna av er parkeringspláss, og stutt er oman í býin við øllum hugsandi møguleikum og tænastum. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við blindan veg. Berjarekka er sera "attraktivt" stað fyri bæði ung sum eldri við einum vælvirkandi eigarafelag, ið m.a. skipar fyri felags sjálvbodnum virksemi nakrar ferðir árliga. Eisini er eitt bakarí / handil beint við eins og sera gott busssamband, og annars er stutt til gongu oman í Gundadal og miðbýin. Har er barnavinaligt við spæliplássi og øllum hentleikum so at siga beint uttan fyri hurðina, og gøtur eru millum býlingarnar. Nakað av útsýni er oman gjøgnum Villingadal.

## Uttanfyri

Húsini eru dagførd og umvæld, so tey eru sum nýggj. Frammanfyri húsini er túnið lagt við brotflísum, og beint við hurðina er snøgt úthús / amboðsrúm. Hinumegin húsini er ein stoypt terassa og eitt fitt stykki, ið kann gerast til urtagarð. Góður sólargangur er hesumegin, og um summarið er sól frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi.

## Innanfyri

Komin inn varnast tú straks, at her er talan um dygd. Vindeyguni eru stór, so tú fært nógv ljós inn. Út frá stovuni kanst tú fara út á terassuna, so tú kanst njóta útilívið á útigólvinum. Rúmini eru snøgg og ljós, hugnalig og fjálg, og húsini eru alt í alt sera livilig. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar, og tær nýtist einki at gera. Alt er sum tað eigur at vera. Gott pláss er á ovasta lofti við tøttum tróðri at goyma ymiskt. Betonveggir eru millum íbúðirnar og betondekk er millum hæddirnar, so ikki hoyrist millum. Húsini er sera væl hildin og so væl viðfarin, at tey at kalla eru sum nýggj.

## Innrætting

Í niðaru hæddini er durur, gongd við flísum og hita í gólvinum og trappu uppá loft, baðirúm (gjørt av nýggjum í 2010), køkur og stova í einum (gjørt av nýggjum í 2005) við hurð út á terassuna / garðin, bryggers og hjallur. Í ovaru hædd er gongd, baðirúm, 2 kømur, harav annað kamarið hevur klædnarúm við spegilsdragihurðum. Frá gongini í erva er lemmur við trappu uppá eitt gott ovasta loft. Múraðir veggir eru í durinum, í gongdunum og í baðirúmunum.

## Fakta

**Bústaður:** ...........**Berjabrekka 143, Tórshavn**
**Byggiár:** ..............**1987**
**Hæddir:**...............**2**
**Gólvvídd:**.............**uml. 107 m²**
**Grundøki:**............**112 m²**
**Prísuppskot:** ......**kr. 1.950.000**









PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**